SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn til leigu

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434

# Tofta skúli

Søkt verður eftir lærarum til Tofta skúla skúlaárið 2001/2002:

- 2 størv 26,5 tímar fyri lærarar í farloyvi
- 1 starv 26,5 tímar
- 1 starv uml. 20 tímar

Størvini, sum eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2001 /2002, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 447332.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni kl. 16.00.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!

**Skúlanevndin í Nes kommunu**
v/ Elin á Torkilsheyggi
655 Nesi

# Skrivari
## til Viðareiðis Kommunu

Viðareiðis Kommuna søkir hervið eftir skrivara, at byrja 1.8.2001.

Av uppgávum kunnu m.a. nevnast:
- Hava Kommunuskrivstovuna opna ein dag um vikuna.
- Bókhald.
- Er skrivari á kommunustýrisfundum.
- Tekur sær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði.

Arbeiðstíðin verður fyribils 10 tímar/viku.

Løn sambært avtalu.

Møguligar umsóknir skulu vera Kommunustýrinum í hendi innan 1. juli ár 2001.

Meira fæst at vita um skrivarastarvið við at venda sær til borgarstjóran.

**Viðareiðis Kommuna**
750 Viðareiði

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrasystir til oyrna-, næsa-hálsdeildina

Á ONH er starv sum sjúkrasystir á starvsbrøki 0,75 leyst at søkja til setan 1. august 2001 ella eftir avtalu.

Á deildini eru 2 sjúkrasystrar, 1 skrivari og tveir serlæknar.

Vit søkja eftir sjúkrasystir:
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- við fakligari vitan og royndum í kirurgiskari sjúkrarøkt
- sum hevur hug til at verða við til at menna og seta sín dám á deildina
- sum er opin og positiv við góðum samstarvsevnum

Vit kunnu bjóða
- eitt áhugavert og spennandi starv
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tværfakligt samarbeiði
- møguleika fyri fakligari og persónligari menning
- upplæring á deildini

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ceciliu Vestureið, yvirsjúkrasystir, telefon 31 35 40, lokal 127 ella kallara 129 ella á e-mail ceci@ahs.fo

Umsóknarfreistin er: 28. juni 2001, kl. 12.00

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Fólk

Til pakkideildina hjá okkum søknast vit eftir fólki til fast arbeiði og fólki at avloysa í summarferiutíðini.

Áhugað biðjast vinarliga venda sær til okkara og tosa við sølustjóran Claus Mørkøre. Tlf. 31 46 50

**P/F Poul Michelsen**

Sosialurin -tað loysir seg

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Útbjóðing

**Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum út arbeiðið at byggja 2 nýggjar dagstovnar, ið hvør skal vera til 36 barnagarðsbørn og 24 vøggustovubørn, at langtíðarleiga kommununi.**

Ætlanin snýr seg um, at arbeiðstakarar, í almennari listatión, kunnu lata inn tilboð uppá at leiga Tórshavnar kommunu 2 nýbygdar dagstovnar í upp til 15 ár. Tað vil siga, at arbeiðstakarin ella felag hansara skal byggja og eiga stovnarnar í upp til 15 ár.

Tilboðsgevarin skal í tilboðnum eisini áseta krónutal, ið Tórshavnar kommuna kann yvirtaka ognirnar fyri, tá ið 15 ára leigutíðarskeiðið er útrunnið. Verða dagstovnarnir (dagstovnurin) yvirtikin, innan 15 ár eru liðin, verður samráðst um yvirtøkuupphæddina.

Grundøkini verða ávíst av Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðstakarin stendur fyri øllum pørtum í byggingini, herundir m.a.:**
- projektering
- útgrevstur, spreinging, planering
- lendisarbeiði
- betong- og kloakkarbeiði
- timbur- og snikkaraarbeiði
- el-arbeiði
- gólvæleggingararbeiði
- múraraarbeiði
- HS-arbeiði og ventilatión
- málaraarbeiði

Leikur og leyst innbúgv skal ikki takast við í tilboðnum.

Útbjóðingartilfar fæst við at venda sær til:

**Snarskivuna**
**Vaglið**
**FO-100 Tórshavn**
**Tlf. 31 51 60**

Í seinasta lagi 25. juni 2001.

Tilboðini skulu verða **Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn**, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juli 2001 kl. 15.00, tá tey verða latin upp í býráðssalinum. Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

Tilboðini, ið skulu vera merkt **"Dagstovnar - Tilboð"**

SNARSKIVAN








# Kappsiglingin á eystanstevnu

verður leygardagin 16. juni.

Starturin verður kl. 15. Umboð fyri bátarnar skulu møta í bátahylinum í Runavík kl. 14.

Tilmelding:
Jónsvein 447084,
Eiler 448176 og
Regin 448587



**Áhugafelagið »Seglið«**

# Maskinmeistari

**søkist**

Søkt verður eftir einum maskinmeistara til at vera feriuavloysari í summar á elverkunum hjá SEV í Suðuroy. Ynskt verður, at viðkomandi kann byrja skjótast gjørligt og vera í starvi til uml. mánaðarskiftið september/oktober í ár.

Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til verkmeistaran á elverkunum í Suðuroy um skrivstovu okkara í Vági, tlf. 373016 ella til skrivstovu okkara í Tórshavn, tlf. 311366.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn.

**Elfelagið SEV**

# Jeepur til sølu

Mazda B 2500 Diesel FWD
Árg.: 04.12.96
Km: 118.000
Prísur: 125.000 við mvg.

**BBR SERVICE**
Við løkin
620 Runavík
Tlf. 449111/219011

# Vøruvognur til sølu

Toyota HI-ACE 2.4 Diesel.
Árg.: 06.08.98
Km: 57.000
Prísur: 148.500 við mvg.

**BBR SERVICE**
Við løkin
620 Runavík
Tlf. 449111/219011



REYNI-SERVICE

# Bilur við skaða

Fyri P/F Trygd selja vit ein Toyota Corolla 2.0 Diesel sedan 4 hurðar. Bilurin hevur skaða og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur við skaða.

Skrásettur fyrstu ferð 14.10.1998.
Km 79.800

**P/F Reyni Service**
**Bilasølan**
tlf. 313040

# Musikkskúlaskipanin

Søkir eftir lærarum í hesum greinum til tíðaravmarkaðar setanir í august 2001.

**Sellolærari** til 3 vikutímar í Klaksvík.

**Klaverlærari** til fulltíðarstarv í Tórshavn, Norðurstreymoy og Sandoy.

**Lærari í slagverki** til 5 vikutímar í Tórshavn.

**Lærari til teori, hoyrilæru og lagsmíð**. Tilsamans 7 vikutímar í Tórshavn.

**Floytulærari** til 6 vikutímar í Vágum.

**Messinglærari** til 6 vikutímar í Fuglafirði og 4 vikutímar í Tórshavn.

**Gittarlærari** til 12 vikutímar í Tórshavn.

**Førleikakrøv:** Musikkpedagogiskt prógv frá konservatorium ella onnur javnsett hægri tónleikaútbúgving krevst. Framførsluroynd kann verða kravd í sambandi við setan.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmala millum Fíggjarmálastýrið og Musikklærarafelagið.

Umsóknarfreist: 25. juni 2001. Meira fæst at vita hjá leiðaranum.

Umsókn skal sendast til:

**Musikkskúlaskipanin**
Martin Mouritsen, leiðari
Hoyvíksvegur 72
FO 100 Tórshavn
Tlf 316462 / 216462 Fax 316991
T-postur: martin@mms.fo

# Høli til leigu

Kjallarin á Sosialinum er til leigu. Hølini eru slakar 100 fermetrar til víddar, inngongd er til hølini frá parkeringsøkinum niðan fyri húsini og parkeringsviðurskiftini eru góð. Nærri fæst at vita við at ringja til Sosialin 311820 ella 216409.

**Sosialurin**

# Fólk søkist

Søkt verður eftir barrfólki og duravørðum at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir avtalu.

Casablanca
Music Café & Restaurant

**Tlf. 319696 / 219696**

# Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir 2 farmakonomnæmingum, at byrja 6. august 2001.

Ert tú áhugað/ur at nema tær útbúgving innan apotek, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:
Læra at arbeiða við heilivági, framleiða heilivág, læra um hvørji evni eru í, og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært givnum lógum.

Læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í sambandi við útflýggjan av apotekaravørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn, í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød, har næmingurin skal í skúla frá 1–4 vikur ísenn, íalt 7 ferðir í lærutíðini. Eftir 2 ár, og tá lærutíðin endar, er prórtøka á skúlanum.

Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
110 Tórshavn

áðrenn 9. juli 2001.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg